# Terji og nólsoyingarnir á Kambsdali

**Terji Rasmussen fer nú leygarkvøldið á pall á Kambsdali við einum bólki mannaðum av nólsoyingum**

KONSERT
*Heri á Rógvi*

Leygarkvøldið, 23, mars, verður kosert á Kambsdali.

Vegna onkra misskiljing hevur tað áður staðið, at konsertin skuldi vera næsta leygarkvøld, men so er ikki. Tað er Terji Rasmussen, sum stendur odda fyri einum bólki á konsertini leygarkvøldið. Talan er um ein nýggjan bólk, ið fyri fyrstu ferð roynir seg til eitt størri tiltak. Flestu føroyingar kenna óivað Terja Rasmussen og hansara tónleik. Terji er nýnólsoyingur, og hann hevur eisini ein bólk við sær leygarkvøldið, ið er mannaður av nólsoyingum. Bólkurin fer at leggja seg eftir at spæla ein góðan blanding av nýggjum og eldri løgum, bæði egið tilfar og tilfari hjá øðrum.

Meðan Terji og hansara nólsoyingar hvíla fáa áhoyarnir fyrsta floks DJ Show at hoyra. Tað er tað sokallaða Hit Show 2002, sum fer at floyma út úr hátalarunum.



*Terji Rasmussen*

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum,
at okkara elskaða mamma, kona, dóttir og systir

**Inga Falkvard Damberg**

andaðist á Landssjúkrahúsinum
20. mars 2002, 32 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Ebenezer
sunnudagin 24. mars kl. 14.00.

*fyri tey avvarðandi*
**Nanna, Marjun og Finn**




12. mai kl. 15.00 í Ítrottarparkini

FCK - Brøndby

Úr Føroyum 9. mai kl. 20.40
Aftur til Føroya 13. mai kl. 08.55

Prísur: kr. 1.995,-
við í prísinum er atgongumerki, rundtúr við Toda í Parkini og ferðaavgjald.
Avmarkað nøgd.

ROCKSHOW 2002
EYEQ, DEN GALE POSE, TV2
COWGIRLS, SAYBIA
FCK og RockShow skipa fyri konsert í Fælledparken í Keypmannahavn 11. mai.
Les meira á www.fck.dk

Sosialurin
í samstarvi við Atlantic Airways

ATLANTIC AIRWAYS
Tel. 34 10 40 · Fax 34 10 01
www.atlantic.fo



Ert tú blástur?

Hevur tú eingi skapanarevni yvirhøvur?
Er grafiska eyga títt starblint?
Ert tú ímyndin av hugflogsloysi?
Dugir tú einki og sleppur tú enn minni?
Mátar tú strekkið millum hugskot og veruleika í ljósárum?
Er eitt knappaborð ikki títt borð?
Hevur tú snøgt sagt kastað hatur á alt hetta nýggja, elektriska at trýsta á?
Hevur tú ikki verið bitin av at tekna síðan tú vart tannleysur skúlanæmingur?
Hevur tú fastan leiklut sum hin hjálparleysi?
Hyggur tú bara niður heldur enn at finna uppá?
Ert tú ov fýrkantaður til at fáast við snið?
Er handalagið sum á maðki?
Ert tú hitt eyðkenda, a-sosiala b-menniskjað?
Veitst tú væl, at tú dugir stak illa við fólki?
Ræðist tú tey villu hugskotini?
Samanumtikið: Ert tú blástur?

So átti tú als ikki at latið verið við at søkt okkara spennandi starv - tvørturímóti
Jákup er maðurin, ið tú ikki skalt órógva hesum viðvíkjandi.
Hansara e-mail er: jakup@reproz.com

Umsóknarfreistin er um at vera farin.
Men hví siga vit tað við teg?
Hav tað!

REPROZ
GRAFISKAR LOYSNIR










Nú kunnu øll keypa sær ein bita av Norðurlondum. Íløgufeløg geva smáspararum møguleika at gera íløgur og fáa teir fyrimunir, sum stórir íleggjarar hava.

**Norrøn partabrøv**
Eitt nýtt íløgufelag er »Norrøn partabrøv«. Her ganga fólk saman um at gera íløgur í stór og viðurkend norðurlendsk partafeløg. Dentur verður lagdur á at spreiða íløguna við at seta pening breitt í norðurlendskar vinnugreinar. Tað ger íløguna tryggari.

**Lánsbrøv í donskum krónum**
Tú kanst eisini gera íløgur í felagið »Lánsbrøv í donskum krónum«. Íløgurnar verða gjørdar í lánsbrøv, sum eru útgivin av danska statinum og øðrum útgevarum við høgum kredittvirði. Lánsbrøv eru tryggari íløga enn partabrøv, men partabrøv kasta meira av sær.

Íløguprógvini kunnu keypast hjá Kaupthing Føroyum ella Føroya Sparikassa.

FØROYA SPARIKASSI
Tel 34 80 00 • Fax 34 83 48 • www.sparikassin.fo

KAUPTHING
Føroyar
Virðisbrævameklarafelag
Tinghúsvegur 14 • FO-110 Tórshavn • tel. 35 15 00 • fax 35 15 01 • www.kaupthing.fo